## Oddagrein



**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*

# GONGUR IKKI Í SJÁLVDRÁTTI

Løgtingið skal taka støðu til, hvussu stórt veiðitrýst vit skulu hava á tilfeingi í okkara sjóøki. Trupult er at fáa semju, tí hugsanirnar eru so ymsar millum serfrøðina innan fiskifrøðina og serfrøðina millum fiskimenn.

Politikarin má velja sær síni fyrilit. Skal hann velja leiðina hjá fiskimonnum, har talan er um løtuvinning, ella skal hann velja leiðina hjá fiskifrøðingunum, sum í øllum førum verður eitt »løtutap«. Verður trýstið skert so nógv, sum fiskifrøðingarnir mæla til, ja so fer at svíða fyrstu tíðina, men sambært hesi serfrøði, so fer tað at løna seg aftur í ríkiligt mát, tá stovnarnir koma fyri seg aftur, og vit við einum minni flota kunnu fiska meira og betri fisk.

Tað tykist heldur løgið, at so ymisk sjónarmið skulu vera um hetta tilfeingi okkara. Bera vit saman við alivinnuna ella oljuvinnuna, so hava vit dugað so avbera væl at skipa hesi viðurskifti. Orsøkin til at fiskivinnan ikki kann skipast eftir sama leisti er helst, at her er talan um eina næstan hálvtannaðhundrað ára gamla vinnu.

Um fiskivinnan var íkomin í okkara tíð, so hevði hon uttan iva verið skipað øðrvísi.

Men tað er ikki gott nokk bara at staðfesta hetta, og so lata alt koyra víðari. Men tað tykist, sum um hetta er leiðin, sum politikarar vilja ganga. Summir tykjast hella til fiskifrøðingarnar, men tá til stykkis kemur, so er tað leiðin hjá fiskimanninum, sum vinnur.

Tað er væl skilligt, at fiskimaðurin ikki vil skerjast, tí einhvør er sær sjálvum næstur. Men tað sigur seg sjálvt, at tá vit troyta stovnarnar so hart, sum vit hava gjørt við toskastovnin, so merkist tað. Tað idéella er sjálvandi, at vit skulu liva av tí, sum stovnurin gevur - av rentuni og rentu av rentu, ella av tí avkasti, sum stovnsfæið gevur. Um vit troyta alla rentuna og part av stovnsfænum við, so verður galin endi, tað kann ein og hvør rokna út.



Tað ber ikki til, at vit sláa øll tilmæli frá fiskifrøðingum upp í glens, bæði okkara heimligu og tey frá ICES og øðrum. Tað er altso ov tápuligt.

Troyta vit stovnsfæið rætt, so fáa vit meira burtur úr stovnunum. Og ja, flotin minkar, verður bíligari at reka, fiskar meira upp á seg, fær meira fyri fiskin, tí hann verður størri og betri fyri, hýrurnar verða hægri, ja, samfelagsinntøkan í heila tikið verður hægri.

Í øllum førum er tað vist, at okkara felags tilfeingi - fólksins ogn - má umsitast av tí almenna. Her má sýnast fyrilit, her gongur tað ikki, at hvør er sær sjálvum næstur.

**Tað gongur ikki, at hvør er sær sjálvum næstur í fiskivinnuni**



*Tað var ein sokallað »Dhow«, sum er eitt typiskt arabiskt farmaskip, sum var í havsneyð, og manningin, seks mans, vóru farnir í bjargingarbátarnar, tá Maersk Ras Laffan kom fram á skipið.*

# Føroyingur bjargaði seks iranum úr havsneyð

Føroyski skiparin, Elnar Niclasen av Tvøroyri, var týsdagin oddamaður í einari bjarging í Persaraflógvanum, sum bjargaði seks iranskum monnum í svárari havsneyð.

Elnar Niclasen er skipari á Mærsk Ras Laffen, sum týsdagin var júst rætta stað til røttu tíð. Og tá stóð hann á odda fyri stórari bjarging í Persaraflógvanum, har seks iranar vóru farnir í bjargingarbátarnar, tá ið støðan á iranska farmaskipinum gjørdist hættislig.

- Stýrimaðurin segði mær, at okkurt løgið var á sjónum. Tað tóktist mest sum, at skipið lá og fleyt, greiðir Elnar Niclasen frá.

Meðan Mærsk Ras Laffen sigldi móti iranska farmaskipinum, sendu menninir eina neyðrakket upp, og Elnar Niclasen var skjótur at broyta kós.

- Við vendu skipinum beinanvegin, og løgdu okkum so tætt at iranska farmaskipinum sum gjørligt, greiður Elnar Niclasen frá.

Tað var trupult, at koma heilt nær at skipinum, tí lutir frá farmaskipinum vóru spjaddar kring økið.

- Yvirstýrimaðurin og aðrir fóru út til bjargingarbátin, og fingu hjálpt monnunum umborð á okkara skip, og tað gekk umleið hálvur tími, so kom eitt skip eftir monnunum, sum tá vóru umborð hjá okkum, greiðir Elnar Niclasen frá.

Stjórin í Mærsk LNG, Claus Thomsen sigur í dag, at tey fegnast um, at føroyski skiparin var so mikið kvikur og dugnaligur, at hann megnaði at bjarga øllum seks monnunum.

Eisini iranska felagið, sum eigur farmaskipið, hevur sent eitt takkarbræv til Elnar Niclasen og hansara manning, og takka teimum fyri at hava bjargað monnunum.



**Seljið útvarpið!**

GUTTORMUR Í SKÁLA
KJAK Á SÍÐU 14



**Guds orð sum valdsamboð**

HANS ANDRIAS SØLVARÁ
SUMMAR SÍÐA 8-9

# Øll sleppa kortini á læraraskúlan

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum hevur gjørt av, at øll á bíðilista til lærara og pedagogútbúgvingarnar verða tikin inn á skúlan kortini.

Hesum boðar hon í kvøld frá. Hon hevur í dag gjørt av, at rektarin á Læraraskúlanum kann taka øll inn, sum standa á bíðilista til lærara- og pedagogútbúgvingarnar.

Helena Dam á Neystabø fegnast um vaksandi áhuganmillum ung at nema sær hægri útbúgving í Føroyum. Yvir 200 lesandi verða nú tikin inn á tær útbúgvingar, sum Fróðskaparsetrið bjóðar út.



- Hildið verður fram at fjøltátta útboðið av hægri útbúgvingum, og miðað verður ímóti at økja samstarvið við onnur universitet í okkara grannalondum, sigur Helena Dam á Neystabø.

Landsstýriskvinnan vísir á, at samgongan leggur stóra orku í at skapa fyritreytir fyri eini góðari útbúgvingarskipan her á landi, sum er ein fyritreyt fyri samfelagsligari menning, vøkstri og trivnaði. Men avbjóðingin er stór, tí fíggjarliga tilfeingið er avmarkað – eisini á útbúgvingar- og mentanarøkinum.

- Tí ræður um, at vit øll læra okkum at tola ávísar skerjingar og broytingar á summum økjum, so vit kunnu raðfesta meira átrokandi virksemi á øðrum økjum. Vit mega duga at húsast, so vit fáa meira fyri teir somu pengarnar, sigur hon.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo